Tórður er eisini við

Tá Tórður Joansson varð biðin um at skriva sítt íkast til Rithøvundabókina, gjørdi hann greitt, at einki skuldi broytast í tí. Antin skuldi alt í - ella einki.

Men ritstjórnin vildi hava ein setning broyttan - og tað fingu vit í blaðnum í gjár til, at Tórður ikki kom við í bókina.

Tað er ikki beint Tórður - og tann broytti setningurin - er við í bókini.

Tvídrátturin hevur staðist av, at Tórður sambært Heðin Klein einastaðni hevði skrivað nakað soleiðis: »Eg havi tann ívasama heiður at hava verið formaður í Framanum og at hava sitið í blaðstjórnini saman við Tummas N. Djurhuus og Hans J. Debes«.

Hetta hevur blaðstjórnin broytt soleiðis: »Hevði tann ívasama heiður at vera bæði formaður í felagnum og í blaðstjórnini«.

Grundgevingin hjá stjórnini var, at hon helt hin setningin seta teir nevndu persónarnar í ringt ljós.

-bb-

Frá Amnesty International Føroya Deild

Kertuljós í gluggan Mannarættindadagin

10. desember er altjóða mannarættindadagur. Henda dag nýta fólk kring allan heim høvið at mótmæla mannarættindabrotum og á einhvønn hátt minnast offrini.

Amnesty International heitir aftur í ár á fólk um at vísa samkenslu við teimum, sum líða undir mannarættindabrotum, við at seta eitt kertuljós í vindeygumi mannarættindadagin 10. des. Hetta er hjá mongum vorðin ein fastur táttur, og vónandi taka uppaftur fleiri undir við hesum tiltaki í ár.

Seinastu árini hevur Amnesty International Føroya Deild skipað fyri tiltøk um hendan dag, og so verður eisini í ár. Básur verður settur upp 9. des. í SMS og í Keypssamtøkuni í Hoyvík fríggjadagin 8. og leygardagin 9. des. Har verður møguleiki at ogna sær vælumtóktu amnestyljósini umframt aðrar skreytlutir frá Amnesty International.

Amnesty International Føroya Deild

Okkum manglar

raskar dreingir

at koyra PIZZA út í býin.

PIZZARIA, tlf. 18866

Teir leggja projektið til rættis. Fv. Arne Rosenkrands Larsen frá Dopas, Martin Heinesen frá Oljufyrisitingini og síðani eitt umboð fyri GEUS, fyrrv. DGU. Her eru teir staddir við boriholið í Lopra. Mynd jan

Skuldi tað ótrúliga hent at oljan sprænir upp í Lopra:

Oljuna eiga tá bara vit føroyingar

Enn eru ikki allar súðir syftar. Nøkur av oljufeløgunum hava tikið ymisk fyrivarni, áðrenn tey skriva endaliga undir uppá at vera við í boringini í Lopra. Roknað verður tó við, at hetta kemur upp á pláss í januar.

-Verður rakt við olju ella gass, tá hava vit ein positivan trupulleika at taka støðu til.

Hetta vóru orðini hjá leiðaranum av føroysku oljufyrisitingini, Martini Heinesen, tá Tíðindablaðið Sosialurin herfyri spurdi hann, hvat fór at henda, um tilvildin ella lagnan vildi tað so, at olja og gass sprændi upp úr holinum, tá farið varð aftur at bora í Lopra.

Nú tilsamans 18 oljufeløg hava sagt seg sinnað til at vera við í eini nýggjari Lopransboring. hevur danska felagið Dopas, sum stendur fyri verkætlanini, fingið skriv frá oljufeløgunum, har tey gera viðmerkingar til ætlanina, og har tey taka ymisk fyrivarni.

Vit spurdu leiðaran á Dopas, Arne Rosenkrands Larsen, um oljufeløgini eisini hava reist spurningin um rakt verður við olju og gass undir boringini, hvør tá eigur rættin til at troyta fæðsluna.

Hesin spurningurin varð reistur undir fyrsta kunnandi fundinum í Havn, tá umboð fyri 22 feløg vitjaðu. Har fingu feløgini greitt at vita, at skuldi hetta hent, so eru tað føroyskir myndugleikar, sum einsamallir eiga rættin til at troyta olju og gass.

Taka fyrivarni

Arne Rosenkrands Larsen vísir á, at nøkur av feløgunum, sum hava játtað at vera við, hava gjørt ymsar viðmerkingar og eisini sett ymisk fyrivarni fyri endaliga at vera við í ætlanini.

Tað verða neyvan trupulleikar at semjast um flestu av fyrivarnunum, men hjá onkrum av feløgunum eru hesi fyrivarni rættuliga víðgongd og umfevnandi, soleiðis at leiðarin fyri verkætlanini heldur tað er ikki rætt longu nú at taka tað sum givið, at verkætlanin verður gjøgnumførd, tó at tað mesta peikar á tað.

Nakað hevur verið tosað um at finna okkurt annað betri hóskandi pláss til eina nýggja boring á landi, men hetta eru feløgini helst farin frá aftur, soleiðis at borað fer at verða í verandi holinum.

Men talan er so um ymsar tekniskar smálutir, sum mugu greiðast. Ætlanin er at bora 3500 m niður, men tað kann blíva talan um at bora enn longur. Síðani kann eisini verða talan um at skipa boriarbeiðið nakað øðrvísi, enn tað er lagt upp til av fyrireikarunum.

Hesir spurningar verða helst allir greiddir, áðrenn farið verður inn í februar mánað. 11. desember verður ein fundur í Keypmannahavn, har umboð fyri øll feløgini fara at royna at gera eina samarbeiðsavtalu.

Hóast slíkt projekt sum hetta ikki er heilt óvanligt, so er tað sera sjáldan, at heili 18 oljufeløg fara undir eitt slíkt samstarv, og tað setir sjálvandi stór krøv til fyrireikararnar.

Eftir øllum at døma verður farið at bora í mai. Tað fara at arbeiða eini 20 fólk við boriarbeiðið í einar tveir mánaðir.

Føroyskir myndugleikar fulla styring við projektinum

Vit spurdu Arne Larsen, um tað er heppið, at tvey feløg í somu konsern, her Dopas og Danop, taka sær av bæði projektering og arbeiðinum sjálvum.

Tað haldi eg ger einki undir teimum serstøku umstøðunum, sum eru galdandi. Vit vita, at her ræddi um at arbeiða skjótt, tí skotbráið var lítið. Tað hevði verið eitt sindur forgreitt, um ein fyrst skuldi roynt at fingið feløg áhugað fyri ætlanini fyri síðani at kappast um, hvør skuldi styra tí. Eg ivast heldur ikki í, at nógv feløg halda tað vera fint, at tey sleppa undan at skula brúka orku til at fyrireika tað arbeiðið, sum vit hava gjørt og gera.

Arne Larsen sigur seg væl skilja føroyingar, um spurnartekin verður sett við, at tvær fyritøkur í sama samtaki fáa allar uppgávurnar. Men eg haldi ikki nakað grundarlag er fyri nøkrum ótta.

Arne Larsen heldur tað vera órealistiskt at halda, at projektið kundi verið stýrt av føroyingum einsamøllum. Hann sigur, at ferra fyritøka hevur fingið drúgv at royndir á umrøddu økjum og tekur sær í dag av stórum og týðandi uppgávum í oljuvinnuni.

Eg haldi eisini, at tað er natúrligt, at føroyingar og danir halda fram við at tosa saman eins og gjørt varð, áðrenn undirgrundin varð yvirtikin. Hann vísir í hesum sambandi á, at tað leingi hevur verið sera gott og tætt samstarv millum føroyskar og danskar jarðfrøðimyndugleikar.

Annars vísir hann á, at føroyingar hava fult tamarhald og stýring á projektinum, og eru allir karmarnir kring tað lagdir í Føroyum. Eftirlitið við verkætlanini verður eisini á hjá føroyskum myndugleikum.

Kunnu tit spinna gull burtur úr hesi uppgávuni?

Nei avgjørt ikki. Projektið verður gjøgnumført sum vanlig projekt í oljuvinnuni, har talan er um "no gain - no loss" tvs. at ein vinnur einki og tapir heldur einki. Tað ber m.a. til at koma og granskoða roknskap okkara og síggja, at vit sum felag ikki mjólka nakrar pengar burtur úr hesum projektinum.

Eg haldi, at føroyingar kunnu vera væl nøgdir við, at Dopas og Danop taka sær av projektinum í Lopra, sigur Arne Rosenkrands Larsen. Harumframt er GEUS ella fyrrverandi DGU við í fyrireikingini, sjálvandi saman við føroysku oljufyrisitingini.